# AME ein norðurlendskur sýnisgluggi

**Atlantic Music Event skal vera avloysarin hjá prixnum. Fyrireikararnir vóna, at áhugin fyri tiltakinum verður stórur, hóast tað ikki verður ein kapping eins og Prix Føroyar**

ATLANTIC MUSIC EVENT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 10 var tíðindafundur, har ið fyrireikararnir av AME greiddu frá tiltakinum. Fróði Vestergaard greiðir frá, at tiltakið kann vera ein sýnisgluggi hjá føroysku tónleikarum. Hann vónar, at nógv vilja taka hond um rundanum tiltakið. Tað er brúk fyri fólki, sum vilja hýsa gestunum, og um teir útlendsku gestirnir verða væl móttiknir í Føroyum, kunnu vit eisini vænta okkum eina góða móttøku, tá ið føroyskir tónleikarar fara uttanlanda.

Feløgini sum standa aftanfyri tiltakið eru m.a. TUTL, 3-arin, Grót, FUT og fleiri. Flestu av føroysku tónleikafestivalunum í Føroyum hava longu boðað frá, at teir stuðla tiltakinum. Hetta verður sostatt eitt slag av avloysara fyri Prix Føroyar finaluna, ið plagdi at verða í Norðurlandahúsinum í apríl mánað. Fyriskipararnir fara eisini at royna at fáa útlendskar gestir til Føroyar hetta vikuskiftið, millum annað umboð fyri festivalar, útgevarar og onnur. Ætlanin er at hava konsertir, fyrilestrar og tílíkt vikuskiftið 13. og 14 apríl 2007 í Norðurlandahúsinum. GBOB vinnarin 2006 verður bjóðaður at luttaka og fleiri onnur, millum annað tey, sum eru vald at hava útgivið bestu fløguna í 2006. Eisini verða nýggir spennandi norðurlendskir bólkar við á AME-Føroyar. Ætlanin er at tilsamans 12 bólkar fara at framføra hetta vikuskiftið, bæði føroyskir og norðurlendskir. Sum nakað nýtt fáa allir føroyskir bólkar møguleika at senda inn eina demoupptøku og latin verður ein virðisløn, sum er ein fløguupptøku við besta bólkinum



*Dánial Hoydal greiddi frá operuni, sum verður framførd í Norðurlandahúsinum, á tíðindafundi í Norðurlandahúsinum í morgun. Har varð greitt frá AME, nýggju heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum og operuni. Talan er um fyrstu føroysku operuna. Tað er stórur áhugi frá útlendskum tíðindafólkum og operuserfrøðingum, sum koma hendanvegin at ummæla. Leikhús kring heimin hava longu spurt seg fyri um nýggju operuna. Dánial hevur skrivað tekstin til operuna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Útlendingar koma at lurta**

AME hevur ikki fingið nakran høvuðsstuðul, men fyrireikararnir vænta ikki, at tað verður nakar trupulleiki.

Fróði Vestergaard vónar, at tað koma fleiri útlendingar hendanvegin at lurta eftir tónleikinum.

– Nakrir av monnunum frá festivalunum og plátufeløgunum, sum hava verið her fyrr til Prix kappingarnar, koma aftur hendan vegin. Eisini skulu vit til ein festival í London, har ið vit ætla at vera úti um okkum. Vónandi fáa vit onkran at koma hendanvegin, sigur Fróði.

Fróði er spentur upp á tiltakið, og hann heldur, at tað kann vera við til at marknaðarføra føroyskan tónleik úti í heimi.

– Hetta er jú eitt norðurlendskt tiltak, so tað røkkur út um landoddarnar, sigur Fróði at enda.

# AME - eitt konsept

**Fyrireikararnir greiða í tíðindaskrivi frá nýggja tiltakinum, sum skal avloysa Prix Føroyar kappingina**

ATLANTIC MUSIC EVENT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

– Sum kunnugt verður einki Prix Føroyar í 2007. Norðurlandahúsið, sum er norðurlendskur stovnur, hevur tí valt at hugsa nýtt, og ætla vit at gera eitt norðurlenskt tiltak ístaðin. Vit hava ætlanir um at eitt nýtt ”koncept” undir heitinum ”A.M.E. Føroyar” (Atlantic Music Event). Hetta verður eitt slag av einari norðurlendskari “showcase” sum einki hevur við kapping at gera.

Vit hava eisini ætlanir um at skipa fyri líknandi A.M.E. átøkum í Íslandi, Danmark, London, New York o.s.fr.

**A.M.E. Føroyar 2007**

– Vit vilja skapa umstøður hjá tónleikarum og fyriskiparum at vísa, hvat føroyingar og aðrir norðurlendingar hava at bjóða á tónlistaøkinum. Endamálið er sostatt at skapa enn størri áhuga fyri føroyskum- og norðurlendskum tónleiki í Føroyum og uttanlanda. Hetta skuldi so ført við sær meira fokus á norðurlendskum tónleik og vónandi størri sølu. Í hesum sambandi fara vit at bjóða teimum, sum skipa fyri music.expo í Danmark, Finnlandi, Svøríki og øðrum Norðurlondum at halda fyrilestrar um úrslit og royndir frá slíkum arbeiði.

Vit ynskja eisini at samstarva við føroyskar festivalfyrireikarar, konsertfyriskiparar og fløguútgevarar og onnur, ið eru áhugað í at verða við í hesum átaki. Møguleiki verður fyri at at seta upp framsýningarbásar o.a. í Norðurlandahúsinum.

Eisini ynskja vit at menna samstarvið, vit hava við útlendskar festivalar, útgevarar, umboðsfólk og onnur eisini uttanfyri Norðurlond.

Hervið gerst A.M.E. Føroyar ein konsert- og framsýningarpallur bæði fyri føroyingar og útlendingar og kann verða við til at savna føroyskar og norðurlendskar kreftir.

Sum nakað nýtt verður eisini skipað fyri einari sangskrivarakapping. Hetta merkir at føroyskir bólkar og einstaklingar kunnu senda inn eina demo til AME-Føroyar. Besta upptøkan vinnur studiotíð fyri 50.000. kr. Meira verður at frætta um reglur og tíðarfreistir seinni, skriva fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

# Norðurlandahúsið nýggja heimasíðu



*Gunvør Nolsøe vísir nýggju heimasíðuna hjá Norðurlandahúsinum fram. Gunvør hevur ment nýggju heimasíðuna. - Hon skal hjálpa Norðurlandahúsinum at røkka út í heim, segði hon*

Starvsfólkini í Norðurlandahúsinum vilja fegin røkka út um landoddarnar við húsinum. Tey vilja fegin gera teirra vøru altjóða seljandi. Gunvør Nolsøe hevur gjørt nýggju heimasíðuna, og fólk eru væl nøgd við hana. Hon varð løgd út í staðin fyri tí gomlu í morgun. - Nýggja síðan er vera væl skipað og hevur róligt design. Hon er pen og kunnandi, segði Gunvør.

**- heinik**